

Nicole Kidman, her í filminum The Interpreter, er best lønta kvinnan í Hollywood

# Hollywood-kvinnur vinna nógvar pengar

Tað eru nógvir pengar at vinna, um tú hevur eydnuna við tær í Hollywood – heimsins filmshøvuðsstaði.

Og tað eru ikki bara menn, sum vinna stóru peningaupphæddirnar, tá ið filmar skulu spælast inn. Kvinnurnar klára sanniliga eisini at verða við, og ein nýggj uppgerð vísir, at best lønta kvinnan fær umleið 100 milliónir krónur fyri ein film.

Tað er australska Nicole Kidman, sum stendur ovast á listanum í løtuni. Hon hevur rættiliga tikið seg fram í Hollywood seinastu árini, og næsta ár hevur hon høvuðsleiklutin í filminum Invasion, og tað hevur fingið hennara løn at fara upp í topp.

Seks av kvinnunum, sum eru at finna á topp 10, hava vunnið eina Oscar-virðisløn, so tær eru eisini viðurkendar á annan hátt enn við stórari løn.

Topp 10 listin sær soleiðis út: 1. Nicole Kidman, 2. Reese Witherspoon, Renee Zellweger, Drew Barrymore, Cameron Diaz, Halle Berry, Charlize Theron, Angelina Jolie, Kirsten Dunst og Jennifer Aniston.

Lønin hjá hesum kvinnum er millum 100 milliónir krónur og 60 milliónir krónur.

Drew Barrymore, Cameron Diaz, Kirsten Dunst og Jennifer Aniston hava ikki enn vunnið Oscar-virðisløn fyri síni avrik á hvíta tjaldinum, men heimskendar eru tær allar.

















